## LEIÐREGLUR

# TRYGGUR ÍTRÓTTUR

**Vit hava øll – starvsfólk, venjarar, leikarar, nevndarlimir, foreldur og onnur avvarðandi – ábyrgd av trygd og trivnaði í fótbóltsumhvørvinum. Leiðreglurnar hjá FSF vísa á, hvat vit vænta av teimum, ið eru partur av fótbóltsumhvørvinum og virkseminum hjá FSF**

### 1 Vit virða og rúma øllum, og vit góðtaka ikki happing ella mismun

Vit halda okkum frá niðrandi orðingum, skemti og gerðum, sum kunnu upplivast sum happing, mismunur ella sálarligur ágangur. Vit virða øll uttan mun til aldur, átrúnað, uppruna, tjóðskap, kyn, kynsliga sannføring ella kropsligar og kognitivar førleikar.

### 2 Vit góðtaka ikki kynsligan ágang

Vit góðtaka ikki seksuellar útsagnir ella gerðir, og fara ikki í einrúm við leikara uttan neyðugt og við atliti til støðuna – hvørki fysiskt ella talgilt.

### 3 Vit byggja ikki persónlig bond, sum kunnu skapa ójavnvág

Alt samskifti er gjøgnumskygt og viðkomandi fyri ítróttin. Vit misnýta onga ntíð álit fyri at skapa fyrimun til okkum sjálvi.

### 4 Vit vísa virðing fyri kropsligum mørkum

Vit tryggja, at nerting altíð er við samtykki og viðkomandi fyri ítróttin, t.d. leiðbeining um teknikk ella stuðul í samband við skaða.

### 5 Vit tryggja hóskandi venjing og hvíld

Vit leggja venjingar til rættis, so samlaða venjingarmongdin er hóskandi fyri aldur og førleika, og geva leikarum neyðuga hvíld og tíð til at koma fyri seg (restituera).

### 6 Vit taka frástøðu frá ólógligum og heilsuskaðandi vanum

Vit freista ongantíð nakran til doping, ólógligar gerðir, ella nýtslu av tubbak, nikotin, rúsdrekka ella rúsevni.

### 7 Vit eru tilvitað um talgildan tryggleika

Vit tryggja gjøgnumskygni og professionelt samskifti, og nýta felagsboð, uttan so at annað er neyðugt fyri at virða privatlív ella tagnarskyldu. Vit fylgja reglum um myndatøku og miðling.

### 8 Vit virða okkara tagnarskyldu

Vit vísa virðing fyri upplýsingum og samrøðum, sum eru í trúnaði – serliga í sambandi við trivnað, heilsu og persónlig viðurskiftir.

### 9 Vit boða frá og handfara støðuna beinanvegin

Vit leggja uppí, tá ið vit varnast okkurt, sum ikki samsvarar við hesar leiðreglur, og vit halda fráboðanarskylduna.

**Um okkurt kennist skeivt ella ótrygt, kanst tú altíð venda tær til trygdar- og trivnaðarfólkið í Fótbóltssamband Føroya**


**Fríða Næs**
***tel. 29 29 47***
**frida@fsf.fo**

**Terji Nielsen**
***tel. 28 90 35***
**terji@fsf.fo**

ella til óheftu ráðgevingina
***Tryggur Ítróttur*** hjá ÍSF
**www.trygguritrottur.fo**